# Bilasavnið opið fríggjadagin



*Hesin Ford TT hjá Vatnsoyra Bilasavni er frá 1922. Hann er júst sama slag, sum tann fyrsti bilurin, ið kom til Føroya. Tað var tann 6. mai í 1922*

Í morgin, fríggjadagin, verður ókeypis at koyra ígjøngum Vágatunnilin - hetta er tvey ára føðingardagurin hjá tunlinum. Eitt av tiltøkunum, ið til ber at vitja hendan dagin, er Vatnsoyrar Bilasavn hjá Hans Elmari Poulsen.

Á savninum eru nógv áhugaverd gomul akfør - teirra millum fleiri av elstu bilum í Føroyum, eitt nú ein 89 ára gamal Ford T og ein Ford TT lastbilur frá 1922, ið er júst sama slag bilur, sum tann fyrsti, ið kom til Føroya hin 6. mai í 1922.

Hans Elmar Poulsen sigur, at opið verður frá kl 13 fríggjadagin.

# Landingarmiðstøðin sett stjóra

1. januar fara tey bæði nýggju feløgini, Landingarmiðstøð Føroya og Faroe Fish Market, undir virksemi sítt.

Tveir stjórar skulu í hesum sambandi setast, og nú stendur í øllum førum greitt, hvør annar teirra er.

Kristian Fríðrik Olsen hevur seinnu árini verið leiðari á deildini hjá Fiskamarknaðinum í Klaksvík, og framyvir verður tað so hann, sum skal stjórna landingarmiðstøðini.

Hetta váttar Harry Benjaminsen, sum er næstformaður í nevndini hjá Fiskamarknaðinum, og sum eis-ini er nevndarlimur í nýggja felagnum.

Eisini skal nýggjur stjóri setast til søluliðið í nýskipaðu feløgunum, Faroe Fish Market. Harry Benjaminsen sigur, at enn er hesin spurningur ikki endalga avgreiddur. Hann vil tó siga somikið, at stjórin er settur, tá virksemið byrjar fyrst í komandi ári.

**-jm**

# Ógvusligt ferðsluóhapp á Toftum

**Ein drukkin bilførari rýmdi av staðnum, tá ið hann seinnapartin mánadagin rendi á ein annan bil á Toftum**

FERÐSLUÓHAPP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eitt ferðsluóhapp á Toftum í mánadagin mundi enda galið. Óhappið hendi um hálvgum fimm tíðina seinnapartin mánadagin, tá ið ein bilur skuldi snara til vinstru við bensinpumpuna við gamla Oyrahandilin niðan á vegin móti Fótbóltsvøllinum. Ein bilur koyrdi beint aftan fyri henda bilin, og bilførarin varnaðist ikki, at fremri bilurin hevði steðgað á og gjørt seg kláran til at snara til vinstru. Hann rendi tí við nógvari ferð upp í reyvina á fremra bilinum, og vakthavandi á politistøðini í Runavík sigur, at stoyturin var so mikið harður, at fremri bilurin styttist einar hálvanannan metur.

## Rýmdi av staðnum

Rygglenið á førarasetrinum brotnaði eisini, og kvinnuligi bilførarin endaði tí bráddliga á baksetrinum. Tíbetur fekk kvinnan tó ongan skaða av stoytinum.

Maðurin, ið koyrdi bilin aftan fyri, steðgaði bilinum, og tá ið fólk komu til, varnaðust tey, at maðurin var drukkin. Løgreglan varð boðsend, men áðrenn hon kom á staðið, var ávirkaði bilførarin rýmdur av staðnum til gongu oman móti bátahylinum.

Løgreglan fór at leita, og tað eydnaðist teimum at finna mannin í øllum myrkrinum. Vaktahavandi sigur, at maðurin var týðuliga drukkin, og helst verður hann dømdur at missa koyrikortið.

Báðir bilarnir fóru rættuliga illa í samanstoytinum.




Ford Transit Connect 2004



Árg. 2004 · Km. 11.500 · silvurgráur
**Eykaútgerð:** El-rútar, 16" alufelgur, takboyla og passager-setur leggjast niður
**GJØRDUR TIL HANDVERKARAN!**
**RING TEL 211 745**